# ri framtíð



*Nýggja nevndin í Atlants Kolvetni. Fv. Jan Eden Evensen, Diana Leo, Birgir Durhuus, Poul Mohr og Mortan Johannesssen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Nógvar uppgávur

-Hvat verður tann fyrsta stóra uppgávan hjá tær og nevndini annars?

-Tað eru nógvar uppgávur, bæði smáar og stórar. Onkur segði við meg eftir nevndarfundin mánadagin, at nú var tað lætta arbeiðið liðugt. Tað er nokk sætt. Felagið hevur jú øðrumegin nøkur sera positiv ting, nevniliga at tað er farið frá oljuleiting til framleiðslu og fer at økja um framleiðsluna innan alt ov leingi. Men samstundis seta allar hesar broytingarnar eisini nýggj krøv til oljufelagið. Har krøvini eru størst uppá kort sikt, er á fíggjarliga økinum, nevniliga kapitalstrukturin hjá felagnum. Útviklingurin gongur út uppá, at felagið hevur ein kapitalstruktur, sum matchar ta nýggju støðuna hjá felagnum, nevniliga at tað ikki longur er eitt leitandi oljufelag við stuttfreistaðum lánum men í veruleikanum hevur møguleikan at fara út og fíggja seg við longri lánum, sum hóska betur til ta framleiðslu felagið hevur.

-Er tað ein yvirkomilig uppgáva?

-Ja tað gangi eg út frá. Vit eru longu byrjaðir uppá ta uppgávuna. Hon er ikki neyðturviliga løtt. Hinvegin skulu vit heldur ikki gera hana torførari enn hon er. Vit vita rættiliga presist, hvat skal til. Og hvussu fer at gangast fáa vit at siggja, hvussu leikur fer.

## Raðfestingar

-Tað hevur verið frammi, at tað hevur verið trupult at endurfíggja skuld og at fáa nýggjan pening til bæði framleiðslu og leiting.

-Avbjóðingarnar hjá okkum uppá stytri sikt er at syrgja fyri at stilla felagið soleiðis, at vit um eitt til tvey ár hava eitt felag, sum øðrumegin svarar hvørjum sítt men sum samtíðis eisini hevur kapital til at vera við í framhaldandi oljuleiting. Nakað tað fyrsta onkur segði við meg, tá eg kom uppí hetta, var, at eitt sunt oljufelag er tað, sum fyri hvørja tunnu av olju, ið verður hálað upp úr undirgrundini, finnur tú eina nýggja. So tað hevur sjálvandi høga raðfesting. Men uppá heilt kort sikt er tað umráðandi fyri okkum longu í heyst at fara út meira partapeningi, soleiðis at vit verða betri fyri, tá vit skulu leggja ta stuttfreistaðu skuldina um til langfreistaða skuld – har tað síðani verður lættari fyri okkum. Vit fáa nógv betri kor, um tann skuldin, ið skal forlongjast, er minni enn hon er í løtuni.

## Realistisk

-Men at fara út til føroyingar og útlendingar eftir nýggjum pengum – er tað ikki í so bjartskygt at rokna við at fólk fara at seta fleiri pengar í felagið í tí støðu tað er í í løtuni?

-Tað verður tosað nógv um, hvørt ein er optimistiskur ella pessimistiskur ella ei. Eg vil siga, at hjá okkum í tí nýggju nevndini er tað avgerandi at vera so realitiskur sum yvirhøvur til ber. Vit fara at vera realisitisk í sambandi við, hvussu nógvar pengar vit kunnu fáa inn og eisini í hvørjum formati vit fara at heinta pengar inn. Her finnast fleiri møguleikar, og vit hava fleiri á borðinum, sum vit arbeiða við í løtuni.

-Hvussu nógv fara tit eftir í nýggjum partapeningi?

-Vit hava ikki lagt okkum fast á upphæddina í løtuni, men tað skal sjálvandi vera ein munagóð upphædd sæð í mun til ta skuld, sum felagið hevur.

-Vil tú harvið siga, at tú metir tað vera gjørligt bæði at fáa meira inn í partapeningi, at umfíggja skuld og fáa nýggj lán til leiting?

-Ja tað geri eg. Tað, sum er umráðandi at nevna her eisini, er tann sannroynd, at felagið er farið undir at framleiða olju, so har koma eisini pengar í kassan tann vegin. Hvussu nógv, ið kemur inn frá felagnum, er sera nær tengt at oljuprísinum. Nú tá oljuprísurin er á 65 til 70 dollarum, so gongur tað enn skjótari at fáa pengar í kassan og er hann lægri, so gongur tað sjálvandi seinni. Í dag verður sera væl fylgt við í oljuprísinum hjá Atlantic, kanska meira enn tað hevur verið gjørt gjøgnum tey síðstu mongu árini.

## Týðandi samstarv

-Tit samstarva í løtuni við StatoilHydro, Dong og Faroe Petroleum um seismiskar kanningar á loyvi tykkara á Føroyaøkinum. Hvat sær tú í hesum?

-Tað síggi eg eisini rættiliga realistiskt uppá. Tær útreiðslur, sum vit hava í tí sambandi, eru jú budgetteraðar. Haldi eisini eg eigi at taka fram her, at alt annað líka, so hava kreditorarnir verið sera vinarligir móti Atlantic Petroleum og ikki minst móti tí nýggju nevndini, har vit hava fingið eitt vist tíðarmál og rásarúm at arbeiða í. Tvs. at vit síggja ikki trupulleikar í teimum uppgávum og verkætlanum, sum liggja fyri framman, kanska innan fyri hálvtannað ár, so út yvir verandi verkætlanir er fóturin traðkaður eitt sindur á bremsuna.

-Oftani er frammi, tá oljuprísir lækka, at serliga smærri feløg verða uppkeypt, ella feløg leggja saman. Tað hevur eisini verið nevnt í føroyskum miðlum møguleikin at leggja bæði tey føroysku feløgini saman í eitt felag, so vit fáa eitt sterkari føroyskt oljufelag. Hvat sigur tú til tað?

-Til tað kann er bara siga generelt, at tað vildi verið skeivt av nýggju nevndini at byrja við at útihýsa møguleikum, so tað gera vit ikki. Eg havi annars skilt, at vit hava fingið nógvar fyrispurningar um samarbeiðsavtalur og fusiónir. Hesar hava vit liggjandi á borðinum, og nýggja nevndin fer at hyggja eftir øllum hesum.

## Virðisskapan

-Nú er leiðslan í felagnum eisini broytt til, at tit hava ein forstjóra og so ein stjóra aftrat. Hvat er orsøkin til hetta?

-Nú var hetta ein avgerð, sum varð tikin av undanfarnu nevnd og sum síðani er sett í gildi av nýggju nevndini. Vit hava sum so ikki umrøtt hetta annað enn at seta avgerðina í gildi.

Birgir Durhuus heldur tað annars ikki er nakar meinbogi fyri felagið, at tríggir av nevndarlimunum hava dagliga arbeiði sítt í útlandinum. –Vit leggja hetta væl til rættis og innrætta okkum so eftir hesum og hava tí eisini brúkt nakað av tíð longu at tosa um, hvussu vit sum nevnd arbeiða saman og hvussu vit arbeiða saman og hvussu við leiðsluni á bestan hátt.

Hvørjir eru so førleikarnir hjá Birgir Durhuus at sita sum formaður í nevndini í Atlants Kolvetni!

-At eg eri vorðin formaður hevur kanska nakað at gera við okkara avbjóðingar uppá stutt sikt. Eg haldi man skal leggja merki til við hesi nýggju nevndini, at her eru tvey oljufólk og ein frá fíggjarverðini. Tað liggur eitt rættiliga sterkt signal í hesum, at tað t.d. ikki blíva tríggir fíggjarfrøðingar, sum koma inn í nevndina. Vit fara so at royna at arbeiða saman sum ein nevnd, har vit hvør sær hava ein leiklut. Aðalmálið hjá eini nevnd í eini fyritøku í dag meti eg vera at vera virðisskapandi. Og tað kunnu vit vera uppá ymsar mátar.

## Grundarlag fyri bjartskygni

-Hvussu sær tú so framtíðina hjá Atlants Kolvetni?

-Eg síggi realistiskt uppá hana. Tað er grundarlag fyri optimismu, um nøkur ting fella uppá pláss, øvugt skal man eisini ansa eftir ikki at vera alt ov optimistiskur, fyrr enn vit eru komin eitt sindur longur á leið við teimum tiltøkum vit eru við at seta í verk.

-Tað er ein rættliga stór ábyrgd tú hevur fingið, har tú skal umsita milliónir av sparipengum hjá føroyingum og har rokskapirnir hjá mongum fyritøkum eru tætt knýttir av úrslitinum hjá felagnum!

-Tað er rætt. Eg haldi man skal gleðast um, at eitt felag hevur so breiða undirtøku. Hinvegin er tað kanska eisini ein veikleiki, at vit ikki hava fleiri íleggjarar uttan fyri Føroyar. Tað fer eisini at verða raðfest hægri í sambandi við at tekna nýggjan partapening.

-Var tað eitt mistak, at man í byrjanini bert loyvdi føroyingum at seta pengar í felagið.

-Tað haldi eg ikki. Ì bakspeglinum kunnu vit siga, at út frá tí sannroynd, hvussu skjótt felagið er vaksið, so hevði kanska verið gott at havt eitt breiðari fundament frá byrjan. Men tað eru framvegis stundir til at bøta uppá tað.

## Eitt stig í senn

-Hvørjar visiónir hevur tú fyri Atlantic Petroleum sjálvur?

-Her eru uppgávur, sum skulu loysast stigvíst. Tað eru nøkur stig á leiðini, áðrenn vit kunnu fara og tosa um nýggjar visiónir og verkætlanir. Fyri mítt viðkomandi er tað umráðandi at taka eitt stig í senn. Men tað liggja nakrar visiónir fyri framman. Eg føli sjálvur, at tað hevur verið sera positivt fyri meg at hava fundir við leiðsluna í felagnum, tí har føli eg liggja nógvar góðar og spennandi visiónir um, hvussu felagið kann síggja út um fleiri ár.

Høvuðsuppgávan uppá kort sikt er at tryggja, at felagið hevur ein struktur, sum matchar tær avbjóðingar og visiónir, sum eru sigur Birgir Durhuus, nýggjur nevndarformaður í Atlants Kolvetni.




*Atlants Kolvetni er við í seismisku kanningunum, sum StatoilHydro stendur á odda fyri á landgrunninum í hesum døgum. Nevndarformaðurin Birgir Durhuus kunnar seg í hesum døgum við oljuvinnuna og vitjaði hann eisini á Vestaru bryggju fyri at síggja Harrier Explorer, sum ger kanningarnar*

*Mynd: Jan Müller*

## Nýggj nevnd í Atlants Kolvetni

Føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni er nú farið til verka við nýggjari nevnd og lutvíst nýggjari leiðslu. Á eykaaðalfundi fríggjadagin varð avgjørt at velja tríggjar nýggjar nevndarlimir. Teir eru Birgir Durhuus, sum dagliga arbeiðir í Den Danske Bank, Jan Evensen, sum starvast í útlendskum oljufelag og Diana Leo, sum arbeiðir hjá Dong. Hinir nevndarlimirnir eru Poul Mohr og Mortan Johannessen. Úr nevndini fóru Kjartan Hoydal, Óli Hammer og Peter Even Djurhuus. Nevndarbroytingin varð eftir kravi frá fíggingarstovnum og varð ein orsøkin torføra støðan hjá felagnum at fáa endurfíggjað skuld. Nýggja nevndin skipaði seg við Birgir Durhuus sum formanni og Poul Mohr sum næstformanni á fundi leygardagin. Síðani er eisini broyting gjørd í leiðsluni. Nýggjur stjóri er Sigurð í Jákupsstovu. Hann skal hava leiðsluna í felagnum saman við forstjóranum Wilhelm Petersen.